## Benayoun leingir við Liverpool

Yossi Benayoun og Liverpool er komin ásamt um, at spælarin leingir sín sáttmála við felagið fram til 2013. Verandi sáttmálin gekk annars fram til summarið 2011, men ísraelin gjørdi somikið nógv vart við seg í fjør, at Rafael Benitez longu nú vildi hava felagið at leingja sáttmálan.



## Franskt talent til United

Manchester United er nú heilt nær við at tryggja sær undirskriftina hjá Gabriel Obertan, sum spælir í Bordeaux. Obertan, sum er 20 ára gamal, hevur gjørt nógv vart við seg á hjá franska felagi sínum, umframt at hann eisini er ein týðandi spælari á franska U21-landsliðnum. Obertan hevur mest verið nýttur sum kantspælari, men hann kann eisini spæla sentralt á miðvøllinum og í álopinum.



Við sigrinum á varmakeldur syrgdi Tvørabáturin fyri, at spenningurin í 6-mannafarsróðrinum hjá monnum helst heldur sær líka til ólavsøku

# Fantastiskt avrik tryggjaði spenningin

**Við sjáldan sæddum sannførandi endaspurti syrgdi Tvørabáturin fyri, at spenningurin um FM heitið í kappingini millum 6-mannafør við monnum er varðveittur**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað kemur fyri, men tað kemur ikki so ofta fyri, at ein bátur er so sannførandi og avgjørdur í endaspurtinum, sum Tvørabáturin var tað leygardagin í Fuglafirði.

Fittan part av 1500 metra teininum bendi nógv á, at spenningurin fór at hvørva í kappingini um FM í róðri millum 6-mannafør við monnum. Men endaspurturin vendi upp og niður upp á plaseringarnar, og úrslitið ber við sær, at tað framvegis er spenningur um FM heitið.

Hóast Tvørabáturin átti besta startin og legði seg meiri enn hálva bátslongd framum Riddaran, ið eisini var aftanfyri Sundabátin, so tóktist alt verða, sum tað plagar at vera, tí í óførum miðróðri legði Riddarin seg á odda.

Higartil í ár hevur tað ikki stemmað soleiðis hjá Sundabátinum, sum tað hevur gjørt undanfarnu árini, men talan hevur verið um støðuga framgongd eftir vánaliga byrjan á norðoyastevnu, og nú kann tað gott vera, at Sundabáturin fer at blanda seg upp í kappingina um sigrarnar.

Eina løtu leygardagin sá tað út til, at Sundabáturin skuldi hótta næstfremsta plássið hjá Tvørabátinum, men soleiðis tørnaði tað kortini ikki út, tí Tvørabáturin sýndi framúr endaspurt.

Tvørabáturin fór fyrstur um málið, tíðin var tann besta, sum nakað 6-mannafar hevur róð í Fuglafirði, og harvið endurtóku suðuroyingar tað, sum teir gjørdu á sundalagsstevnu, tá ið bæði Firvaldur við gentum og Tvørabáturin vunnu.

Riddarin er framvegis fremstur í FM kappingini og favorittur til at verða meistari. Men munurin er bara eitt stig, og tí verður einki avgjørt fyrrenn á Ólavsøku.

Róðurin í Fuglafirði vísti, at tað á Vestanstevnu í sandavági leygardagin mugu metast at vera tríggir bátar, ið fara at liggja framvið at vinna!

# Argir hava vunnið FM

**Um Argjabáturin kemur á mál í tveimum teimum seinastu róðrunum, so vinnur hann meistaraheitið**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eingin ivi er um tað. Argjabáturin vinnur FM í ár. Tað siga tølini, eftir at Argjabáturin á varmakeldu í Fuglafirði vann fyri fimtu ferð av fimm møguligum.

Teir fimm sigrarnir hava borið 35 stig í úrtøku. Ørvur er næstfremst við 26 stigum. Bara fýra bátar luttaka í kappingini. Aftasti báturin fær trý stig. Tað vil siga, at Argjabáturin eigur trygd fyri 41 stigum. Um alt skuldi vent á høvdið tvær tær síðstu ferðirnar, og Argjabáturin endaði aftast, og Ørvur vann, so hevði stigatalið hjá Ørvi verið 40.

Aftur leygardagin royndi Árnfirðingur at hanga uppií, og tað eydnaðist fyrsta lítla helmingin av 1500 metra teininum. Men so slitnaði sundur, og á málinum var munurin næstan so stórur, sum hann hevur verið undanfarnu ferðirnar.



Enn einaferð róði Argjabáturin púra einsamallur á málið, meðan restin av feltinum kappaðist um næstu plássini Mynd: Argjabáturin
Enn einaferð róði Argjabáturin púra einsamallur á málið, meðan restin av feltinum kappaðist um næstu plássini



Kappingin er knallhørð í genturóðrinum, har Firvaldur og Jallurin báðir hava sama stigatal

# Úr dalinum og upp á kambin

**Eftir vónbrotið í heimasjógvi á jóansøku, eydnaðist tað Firvaldi av Tvøroyri at vinna genturóðurin á varmakeldu**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyri stórari viku síðani sótu tær umborð á Firvaldi ógvuliga vónbrotnar, tá ið róðurin millum 5-mannafør við gentum var av. Í heimasjógvi á Trongisvágsfirði vórðu tær snýttar av Báruni, sum ikki hevði luttikið í ár, og sum vann á jóansøku.

Á varmakeldu luttók Báran ikki, og á varmakeldu var eingin ivi. Firvaldur og Jallurin løgdu seg beinanvegin fremst, og Sílið royndi at hanga uppií.

Skjótt hevði Firvaldur vunnið seg eina hálva bátslongd framum Jallin, og Jallurin megnaði ongantíð rættiliga at svara aftur. Firvaldur var fyrstur á mál, og nú er sera tøtt kapping um FM. Bæði Firvaldur og Jallurin hava 31 stig.